# BØNARLØTAN

Januar 2019 34. árg.

## *1. Nýggjársdagur* *Jóh. 1.1-27*






### DANMARK, Keypmannahavn
### Susan og Øssur Berghamar

„Vit vitja og hava andaktir á Sjúklingahotellinum, Ríkissjúkrahúsinum og øðrum sjúkrahúsum. Vit síggja javnan sjúklingabussin koyra inn í túnið í Kristnastovu við sjúklingum og avvarðandi. Vit hava samband við føroyingar, sum kenna seg einsamallar, tí hava vit eldrasamkomur. Sigið okkum frá, um tit vita um fólk, sum eru niðri í sjúkraørindum“. Hesin samandráttur lýsir Øssur og Susan, sum hava hjálpt lesandi og tænt sjúkum og líðandi síðan 1973. Bønarløtan gleðist um, at Øssur hevur fingið heiðurin Ársins Føroyingur. Øssur hevur skrivað bóklingin „Ein dag í senn“ við 31 andaktum at geva fólki. berghamar@kristnastova.dk

# GOTT NÝGGJÁR!

***…Hann, sum byrjaði gott verk í tykkum, skal eisini fullføra tað til dag Jesu Krists.***

***Fil. 1.6***

**BULUR Á SIGNABØ. Nýggjársmøti 4. - 6. jan.**

Poul Færø, Jákup N. Olsen, Eyðfinn Reyðberg og Arne Simonsen hava møti á Signabø. 4. jan. kl. 20 Triple Trio í Ebenezer, 5. jan. kl. 20 Kvartettin í Betesda, 6. jan. kl. 19 Manskórið í Ebenezer. Heiti: Jóh. 3.16.

**KRINGVARPIÐ**

| | |
|---|---|
| 6. jan. | Sjónvarpsandakt, Hjørleif Vang |
| 3. febr. | Útvarpsmøti, Kedron, Sørvágur |
| 10. febr. | Sjónvarpsmøti, Nazaret, Kaldbak |

**R7** (meir á www.evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*

Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

**Føroysk møti í Jútlandi**

12. jan. kl.19 í Livets kilde, Ådalsparken 33, Esbjerg.

**FØROYAR**

**NTM FØROYAR**

**Noomi og Eli Christiansen**

**Hadassa 7, Tabita 4, Debora 3, Natan 0**

29. - 31. mars fara vit við liði til NTM í Onglandi á skeiðið Reach. Fleiri hava teknað seg, men tú hevur enn møguleika at koma við. Tilmeldingarfreistin er 10. jan. Kunning á ntm@mail.fo ella tel. 230009

## *2. Mikudagur* *Jóh. 1.28-52*



**FØROYAR, Atlantic Mission**
**Birgit og Svenning av Lofti**

15. - 22. jan. fara Svenning av Lofti, Ruth Gaardlykke og Páll á Lakjuni á vitjan í oynni Mull við vesturstrond Skotlands. Endamálið er at fáa samband við samkomur og einstaklingar har og inni á skotska meginlandinum fyri at fyrireika vitjan við „Juvel II" á páskum í apríl. Meir kunning í bønarløtuni í febr. og hjá Svenning av Lofti tel. 212045 og á lofti@olivant.fo ella hjá Ruth Gaardlykke, tel. 519090 og gaardlykke@kallnet.fo

## *3. Hósdagur* *Sálmur 28 og 29*



**DANMARK, Keypmannahavn, Kristnastova**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 10, Andreas 9, Kristina 7**

Møtini fríggjakvøld byrja aftur 11. jan. Okkum tørvar vísdóm, sum vit saman við øðrum fyrireika og skipa møtir og onnur tiltøk í vár.



**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Vanja og Svein í Prestgarði**
**Jenny 11, Svend 9, Terji 6, Petra 4**

## *4. Fríggjadagur* *4. Mós. 1.1-25*



**DANMARK, Hirtshals, Malta**
**Anna og Hans Djurhuus**
Vit takka fyri árið, sum fór, og ynskja øllum eitt av Harranum vælsignað nýggjár. Biðið fyri okkum, sum vit halda á í tænastuni á Malta.

**FØROYAR**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Rutt og John í Skemmuni**

## *5. Leygardagur* *Jóh. 2.1-25*



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**
Vit eru nú á Filipsoyggjum, men 12. - 21. jan. eru vit í Malaisia, har eg skal tala í samkomu í eina viku. 15. - 19. jan. hava vit altjóða leiðslufundir, samstundis sum vit eisini hava samtalur við teir, sum umboða NTM í Malaisia, Singapore og Indonesia. 30. jan. liggur leiðin heimaftur til USA.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

**ÍRLAND**
**Guðrun og Ivor Tutty, Karina 17**

## *6. Sunnudagur* *4. Mós. 1.26-54*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit gera upptøkur av Markusar Evangelii. Okkum tørvar vísdóm at velja fólk at rættlesa einstøku partarnar. Vit endurskoða eisini Ápostlasøguna – tað arbeiðið er drúgt.

★ Í dag fyllir Bethany Jacobsen 4 ár.

## *7. Mánadagur* *Jóh. 3.1-19*

**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 14, Victoria 12, Emma Grace 10, Jónatan 9, Markus 6, Evita Linda 3, Joy Hanna 1**

Vit eru Gudi takksom fyri góða heilsu. Biðið, at tey, sum nú eru byrjað at koma til møtini, taka ímóti boðskapinum til frelsu. Minnist José Luis, sum fer at undirvísa í ár. Biðið eisini fyri nýggja forsetanum Andrés Manuel López Obrador, sum tók við valdinum 1. des. Hann hevur lovað stórar broytingar og at basa korruptión. Biðið, at frælsi verður framhaldandi at evangelisera og virka sum trúboðarar.

## *8. Týsdagur* *4. Mós. 2.1-34*

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen, Ísak 16**

Eg havi fingið innfararloyvi og ferðaætlan til næsta túr til Sorimi. Biðið fyri mær, sum eg haldi á at umseta Bíbliuna og fyrireika ferðina. Minnist eisini samkomurnar í Sorimi.

★ Í dag fyllir Ragnhild Sharp 15 ár.

## 9. Mikudagur Jóh. 3.20-36

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 10**

Vit eru Gudi takksom fyri góða undirtøku í trúarverjuskúlunum. Neyðugt verður í ár at útbúgva eitt úrvalslið av ungfólki at hava ábyrgd av hesum arbeiðnum. Latið okkum røkta og fyrireika okkara góða ungdóm í samkomunum væl. Biðið fyri okkum sum familju og heilsustøðu okkara.



**DANMARK, Måløv**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam Joy 15, Noah 12,**
**Lydia Sigrid 1**

## 10. Hósdagur Sálmur 30



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Erla og Ingvard Petersen (f)**
**Natan 15**

Vit halda á at vitja samkomur henda mánaðin. Ynski okkara er at vísa á Kristus og tað samfelag, vit finna í honum gjøgnum Skriftinar. Ingvard fyrireikar seg eisini at undirvísa í Kolossebrævinum á North Cotes College í febr.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

⋆ Í dag fyllir Joy Hanna Tuohy 2 ár.

## *11. Fríggjadagur* *4. Mós. 3.1-26*



### DANMARK, Kolding
### Jan og Anne Zachariassen

Gott nýggjár og hjartans tøkk fyri farna árið! Vit verða í Danmark allan jan. fyri at vitja Fredericia, Vejle, Aarhus og Keypmannahavn. Eg verði fólkapensiónistur í jan.; men um Harrin loyvir, ætli eg mær ikki at gevast, men at halda á sum Móses og onnur í høgum aldri. Biðið fyri deyvamissiónsmarkini, serliga at umseta Bíbliuna til teknmál.

### DANMARK
### Glostrup Frikirke

## *12. Leygardagur* *Jóh. 4.1-26*

### GRØNLAND, Juvel II
### Anna og Óli Steinberg

Summarferðaætlanin hjá Juvel II er komin. Farið verður heilt norður til Qaarnaq í Thuleøkinum, har vit síðst vóru við Oqaseq (Sildberanum) í 1977. Vit enda í Amassalikøkinum í Eysturgrønlandi; tá er bert Scoresbysund eftir, har vit ikki hava verið enn. Ferðaætlan sæst á steinberg@olivant.fo

### ONGLAND, Birmingham, OM
### Claire og Craig Niclasen
### Elizabeth 12, Rebekah 10, Lydia 8



## *13. Sunnudagur* *4. Mós. 3.27-51*

**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Biðið, at Harrin sendir arbeiðsfólk at gera starvsfólkahúsið liðugt, áðrenn legurnar byrja, og at hann leggur fólki á hjarta at koma yvir at hjálpa til við legunum.

## *14. Mánadagur* *Jóh. 4.27-54*

**GRØNLAND, Nuuk, Hans Sivertsen**
**Filip og Ane Sivertsen, Cecilie 14, Kristian 12**
**Óli og Anne-Sophie Tindalíð, Liljan 12, Leanna 11**

Her eru nógv heimleys, og nógv hava tað torført. Nøkur hava í huga at byrja sunnudagsskúla í jan. í Ebenezer fyri yngru børnunum. Eini 5 - 10 børn undir 9 ár koma javnan og av og á til møtini við foreldrunum. Vit mugu taka støðu til, nær á degnum sunnudagsskúlin skal vera, tí fleiri avbjóðingar eru, serliga tí bygningurin er so lítil og hevur bara tvey stór høli. Ringt er at skilja ymisku tiltøkini sundur, tí væl hoyrist millum møtisalin og matarhølið, har sunnudagsskúlin kann vera.

## *15. Týsdagur* *4. Mós. 4.1-23*



**GRØNLAND, Qasigiannguit**
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit taka skeið at læra at fyribyrgja sjálvmorði. Vit eru takksom at kunna taka slík skeið umframt ymisk siglingarskeið, meðan vit bíða eftir, at málið um dupulta ríkisborgararættin hjá Solveig verður avgreitt. Biðið framhaldandi fyri tryggum túri úr Nýfoundlandi til Grønlands í juli.

## 16. Mikudagur — Jóh. 5.1-23



**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

Báðir prentararnir, sum vit nýliga keyptu úr USA til prentstøðina, eru komnir fram í øllum góðum. Vit eru takksom fyri gávu úr Føroyum, sum gjørdi keypið møguligt. Nú kunnu vit aftur prenta 300 ørk um minuttin, sum er munandi skjótari enn áður. Samstundis komu 130 pappeskjur við mati til okkum og trúboðararnar í ættarbólkunum. Vit kenna okkum ríkliga signað og takka Harranum fyri náðisystkin okkara.

⋆ Í dag fyllir Hadassa Christiansen 8 ár

## 17. Hósdagur — Sálmur 31



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Vit eru takksom fyri vitjanina í NTM í Grimsby, har vit høvdu frálíkar samrøður við næmingar. Vit umhugsa at fara til Føroya í juni. Anna megnar at fara til fimm tiltøk um vikuna uttan fyri heimið saman við hjálpara. Videoupptøkurnar hjá Dubby ganga nakað seinni. Sí dømi á: youtube.com/user/dubby-rodda/videos. Honum tørvar onkran at hjálpa at redigera o.a. Biðið, at Dubby fær íblástur at luta lív og sannleika. Vit vita ikki, hvussu nógv saafifólk lurta eftir Skriftunum, sum vit lutaðu, tá vit vitjaðu; men biðið, at mong lurta og fara at hungra eftir meiri. Bíbliusendingarnar hjá Augustin verða nú sendar á FacebookLive!

## *18. Fríggjadagur* *4. Mós. 4.24-49*



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit ynskja tykkum, sum biða fyri okkum og arbeiðnum í Calvary Church, eitt av Harranum signað nýggjár við 1000 tøkk fyri allar bønir fyri okkum.

**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 11**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**

**ITALIA, Sant'Elia**
**Heidi og Regin Guttesen**
**Noah 16, Megan 14, Trisha 6, Emma 2**

## *19. Leygardagur* *Jóh. 5. 24-47*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Vit eru takksom fyri farna árið, fyri signingar og avbjóðingar og Harrans trúfesti. Takk fyri forbøn! Vit ynskja øllum forbiðjarum eitt av Harranum signað nýggjár!

**FRAKLAND, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen, Sarah 8, Leah Eve 5**

## *20. Sunnudagur* *4. Mós. 5.1-31*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen, Caleb 16**

Takk fyri tíðina, eg var í Føroyum í nov. Tað var signingarríkt at hitta so mong stuttu tíðina, eg var heima. Biðið, at vit í 2019 verða til signing og hjálp fyri trúboðarar kring heimin. Takk fyri forbøn!

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 7**

## *21. Mánadagur* *Jóh. 6.1-21*



**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 13, Aron 6, Noah Kristian 5**

Í samráð við nevndina taki eg við sum leiðari í The Well International. Takk fyri forbøn hesum viðvíkjandi. Sjálvt um vit nú eru 18 starvsfólk, sum hvør sær taka sær av sínum ávísu trúboðarum, hava vit ikki umstøður at hjálpa øllum, ið søkja sær hjálp. Biðið fyri Kina, nú kinesiska stjórnin miðar ímóti at burturvísa øllum útlendskum trúboðarum. Vit kenna hundraðtals trúboðarar, ið eru vístir burtur úr Kina í 2018, og vit hoyra hvørja viku um enn fleiri. Nógvir teirra hava arbeitt í Kina í áratíggju. Fleiri søkja sær hjálp hjá okkum í Chiang Mai.

**SKOTLAND, Motherwell**
**GLO, Tilsley College**
**Dorit og Simon Marshall**

## 22. Týsdagur 4. Mós. 6.1-27

**PAPUA NÝGUNEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 10, Noah 9, Karis 5, Judah 3, Ethan 1**

Vit eru nú farin aftur til PNG at virka millum Mengenfólkið eftir fleiri ár í Bretlandi. Vit eru takksom fyri tað, vit hava lært hesi farnu seks árini. Vit upplivdu, at Karis mátti fáa tvær hjartaskurðviðgerðir. Tað var ein framíhjárættur at undirvísa næmingum á North Cotes skúlanum. Okkara ætlanir vórðu órógvaðar av lívsumstøðum, men vit hava kent Guds hond í øllum. Biðið, at vit falla væl til aftur og fáa nógv burturúr fyrstu vikurnar!

## 23. Mikudagur Jóh. 6.22-44



**FILIPSOYGGJAR,**
**Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Vit verða í USA fyrru helvt av jan. til fundir saman við øðrum umsetingar-ráðgevum.

## 24. Hódagur Sálmur 32

**ZAMBIA, Ndola, GLO**
**Nanna og David Lukama**
**Josiah 14, Micah 11, Ezra 10, Uhenya 7, Boas 5**

Vit eru Harranum takksom fyri hansara trúfesti farna árið. Vit takka fyri allan stuðul og forbøn.

## 25. Fríggjadagur — 4. Mós. 7.1-29



**SENEGAL, Tongia**
**Lív Poulsen**

Eg rættlesi Opinberingina, Kolossebrævið, Galatiabrævið og 2. Korintbræv saman við ymiskum málhjálparum. Ungi maðurin her úr bygdini, ið sjálvur umsetir úr G.T., hevur hjálpt mær við kladdunum hesaferð, tí tann vanligi hjálparin ikki hevur havt møguleika til tess. Tað hevur verið til stóra signing og hjálp. Eg havi aftur bíbliulesnað við kvinnunum eina ferð um vikuna. Biðið, at tær velja at fylgja Jesusi eina. Mínir starvsfelagar koma væntandi aftur til bygdina síðst í jan. Biðið eisini, at tað skal ganga væl hesar seinastu vikurnar, eg eri einsamøll. Eitt av Harranum signað nýggjár ynskist tykkum øllum.

## 26. Leygardagur — Jóh. 6.45-71

**SVEIS, Nyon, Westlake Church**
**Jeanette og Solomon Magura, Reuben 5, Micah 5**

Vit eru takksom fyri trúfesti Guds í farna ári. Hóast nógvar avbjóðingar hava vit kent nærveru Guds í øllum. Biðið, at vit fáa vísdóm í sambandi við trongu hølisviðurskiftini! Tað gongur striltið at finna føst høli at savnast í.

**GUINEA VESTURAFRIKA, Tarencha, Nalu**
**Marion og Hans Arni Jensen**
**Jens Allan 17, Ryan 9**

## *27. Sunnudagur* *4. Mós. 7.30-59*

**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 15, Rebekka 13, Hanna 10**

Fleiri trúboðarar hjá NTM eru farnir í farloyvi í seinastuni; tí liggja fleiri av praktisku uppgávunum, teir høvdu, nú á okkum.

★ Í dag fyllir Micah Lukama 12 ár

## *28. Mánadagur* *Jóh. 7.1-24*

**FILIPSOYGGJAR, NTM**
**Liz og Ragnar Niclasen**

Vit hava á fyrsta sinni síðan 1999 hildið jól saman við familju her í Kanada. Vit takka Gudi og hava notið tíðina saman. Serliga stuttligt var at síggja barnabørnini luttaka í ymsum jólaframførslum. Nú eru vit aftur í fjareystri og skriva triðja savn av tilfari til Kankanaey-samkomuna, sum viðger Ápostlasøguna. Spennandi! Vit gleðast um, at fyrsta savnið verður brúkt av mongum. Biðið, at nýggja tilfarið eisini verður brúkt í samkomuni.

★ Í dag fyllir Adonia Johannesen 11 ár.
★ Í dag fyllir Emma Grace Tuohy 11 ár.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Selma Godtfred, Kristianna J. Heinesen, Jónvør Christiansen, Lea Wolles, Barbara og Ragnar Vest, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.
**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk

## 29. Týsdagur 4. Mós. 7.60-89



**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 1**

Vit hava havt fund við familjurnar Stanley og Stous um samstarv, sum tykist vera ein møguleiki. Møguliga kunnu vit byggja húsini í hesum árinum og byrja at læra málið í einum ættarbólki. Takk fyri forbøn.

## 30. Mikudagur Jóh. 7.25-53



**JAPAN**
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 9, Nana 7, Louie 5**

Tvær japanskar kvinnur, sum ikki kenna Harran, vilja fegnar vita meira um Bíbliuna og Jesus. Shino fer tí at byrja lítlan bíbliubólk við teimum. Biðið fyri teimum og Shino, sum skal leiða bólkin, og at fleiri eisini fáa hug at koma uppí.

★ Í dag fyllir Petra í Prestgarði 5 ár.
★ Í dag fyllir Tabita Christiansen 5 ár.

**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Telduppostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

**©KBS.** *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

**Nýggj bók!**

**200 kr.**




Martin de Lange og konan Petro siga frá, hvussu kristin verða forfylgd í Turkalandi í dag. Tey fóru úr Suðurafrika við OM og bóru turkum gleðiboðskapin í 14 ár. Fýra samkomur vórðu stovnaðar, men at enda máttu tey rýma. Stutt eftir vórðu tríggir starvsfelagar dripnir. Tey tæna nú millum turkar í Fraklandi. 79 milliónir búgva í Turkalandi, 99% eru muslimar. Alment er landið sekulert við trúarfrælsi. Hetta er søgan um, hvussu Ríki Guds eisini veksur í dag hóast mótstøðu, sum kostar mannalív.

Opið gerandisdagar kl. 14-18,
leygardag kl. 12-16.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo